### Danska Sas-ligan

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK (M) | 16 | 13 - 3 - 0 | 33 | 8 | 25 | 42 |
| 2 Brøndby (S) | 16 | 11 - 3 - 2 | 36 | 14 | 22 | 36 |
| 3 Viborg | 16 | 10 - 4 - 2 | 33 | 16 | 17 | 34 |
| 4 OB | 16 | 6 - 5 - 5 | 21 | 18 | 3 | 23 |
| 5 FC Nordsj. | 16 | 5 - 7 - 4 | 25 | 19 | 6 | 22 |
| 6 AaB | 16 | 4 - 6 - 6 | 20 | 22 | -2 | 18 |
| 7 FCM | 16 | 4 - 5 - 7 | 20 | 30 | -10 | 17 |
| 8 Esbjerg | 16 | 4 - 4 - 8 | 18 | 25 | -7 | 16 |
| 9 AC Horsens | 16 | 2 - 8 - 6 | 7 | 19 | -12 | 14 |
| 10 Silkeborg | 16 | 3 - 5 - 8 | 12 | 25 | -13 | 14 |
| 11 AGF | 16 | 2 - 6 - 8 | 22 | 35 | -13 | 12 |
| 12 SønderjyskE | 16 | 3 - 2 - 11 | 20 | 36 | -16 | 11 |

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab), Rógvi Jacobsen (SønderjyskE)

### Danska 1. deild

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Køge | 14 | 8 - 4 - 2 | 30 | 15 | 15 | 28 |
| 2 Kolding | 14 | 9 - 1 - 4 | 27 | 20 | 7 | 28 |
| 3 Randers FC | 14 | 9 - 0 - 5 | 32 | 18 | 14 | 27 |
| 4 Vejle | 13 | 7 - 3 - 3 | 25 | 17 | 8 | 24 |
| 5 Herfølge | 14 | 7 - 2 - 5 | 30 | 17 | 13 | 23 |
| 6 Lyngby | 14 | 7 - 2 - 5 | 25 | 20 | 5 | 23 |
| 7 Fremad Amager | 14 | 6 - 3 - 5 | 27 | 28 | -1 | 21 |
| 8 FC Fredericia | 14 | 6 - 2 - 6 | 26 | 22 | 4 | 20 |
| 9 NFA | 14 | 6 - 2 - 6 | 25 | 23 | 2 | 20 |
| 10 Frem | 14 | 5 - 4 - 5 | 24 | 18 | 6 | 19 |
| 11 Ølstykke | 14 | 5 - 4 - 5 | 17 | 17 | 0 | 19 |
| 12 HIK | 14 | 3 - 8 - 3 | 15 | 16 | -1 | 17 |
| 13 Brabrand | 14 | 5 - 1 - 8 | 14 | 28 | -14 | 16 |
| 14 AB | 14 | 3 - 2 - 9 | 16 | 35 | -19 | 11 |
| 15 Skjold | 13 | 1 - 4 - 8 | 12 | 29 | -17 | 7 |
| 16 Brønshøj | 14 | 1 - 4 - 9 | 15 | 37 | -22 | 7 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Skjold)

### Norska Tippeligan

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Våleranga | 26 | 13 - 7 - 6 | 40 | 27 | 13 | 46 |
| 2 Start | 26 | 13 - 6 - 7 | 47 | 35 | 12 | 45 |
| 3 Lyn Oslo | 26 | 12 - 8 - 6 | 37 | 21 | 16 | 44 |
| 4 Lillestrøm | 26 | 12 - 6 - 8 | 37 | 31 | 6 | 42 |
| 5 Viking | 26 | 12 - 5 - 9 | 37 | 32 | 5 | 41 |
| 6 Brann | 26 | 10 - 7 - 9 | 43 | 32 | 11 | 37 |
| 7 Rosenborg | 26 | 10 - 4 - 12 | 50 | 42 | 8 | 34 |
| 8 Tromsø | 26 | 8 - 10- 8 | 31 | 30 | 1 | 34 |
| 9 Odd Grenland | 26 | 9 - 6 - 11 | 28 | 51 | -23 | 33 |
| 10 HamarKam | 26 | 8 - 7 - 11 | 31 | 37 | -6 | 31 |
| 11 Fredrikstad | 26 | 8 - 7 - 11 | 35 | 44 | -9 | 31 |
| 12 Molde | 26 | 8 - 6 - 12 | 40 | 46 | -6 | 30 |
| 13 Aalesund | 26 | 6 - 9 - 11 | 30 | 42 | -12 | 27 |
| 14 Bodø/Glimt | 26 | 6 - 6 - 14 | 29 | 45 | -16 | 24 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (Start)

### Enska League Championship

| | d | v - j - t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sheff Utd. | 16 | 12 - 2 - 2 | 31 | 13 | 18 | 38 |
| 2 Reading | 16 | 10 - 5 - 1 | 26 | 9 | 17 | 35 |
| 3 Luton | 16 | 8 - 4 - 4 | 25 | 18 | 7 | 28 |
| 4 Watford | 16 | 7 - 5 - 4 | 26 | 19 | 7 | 26 |
| 5 Leeds | 15 | 7 - 5 - 3 | 19 | 14 | 5 | 26 |
| 6 Crystal Palace | 15 | 7 - 3 - 5 | 24 | 15 | 9 | 24 |
| 7 Southampton | 16 | 5 - 9 - 2 | 19 | 13 | 6 | 24 |
| 8 QPR | 16 | 6 - 6 - 4 | 18 | 18 | 0 | 24 |
| 9 Cardiff | 15 | 6 - 5 - 4 | 25 | 18 | 7 | 23 |
| 10 Wolverhampton | 16 | 5 - 6 - 5 | 20 | 17 | 3 | 21 |
| 11 Burnley | 16 | 5 - 4 - 7 | 21 | 20 | 1 | 19 |
| 12 Leicester | 16 | 4 - 7 - 5 | 16 | 18 | -2 | 19 |
| 13 Ipswich | 16 | 5 - 4 - 7 | 15 | 23 | -8 | 19 |
| 14 Stoke | 16 | 6 - 1 - 9 | 15 | 24 | -9 | 19 |
| 15 Hull | 16 | 4 - 6 - 6 | 13 | 14 | -1 | 18 |
| 16 Preston | 16 | 3 - 9 - 4 | 16 | 18 | -2 | 18 |
| 17 Derby | 16 | 3 - 8 - 5 | 21 | 23 | -2 | 17 |
| 18 Sheff Wed | 15 | 3 - 7 - 5 | 13 | 17 | -4 | 16 |
| 19 Coventry | 16 | 3 - 7 - 6 | 20 | 26 | -6 | 16 |
| 20 Norwich | 16 | 4 - 4 - 8 | 16 | 22 | -6 | 16 |
| 21 Plymouth | 16 | 3 - 7 - 6 | 12 | 19 | -7 | 16 |
| 22 Brighton | 16 | 2 - 9 - 5 | 16 | 21 | -5 | 15 |
| 23 Crewe | 16 | 2 - 7 - 7 | 17 | 31 | -14 | 13 |
| 24 Millwall | 16 | 2 - 6 - 8 | 11 | 25 | -14 | 12 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)

# Frem og Fremad fingu fult

**Fyri fjórðu ferð á rað fóru teir í Frem av vøllinum við úrtøku, og eftir fýra ferðir at hava tapt, eydnaðist tað Fremad Amager at vinna**

DANMARK 1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Tað eydnaðist ikki hjá Gunnari Nielsen at koma so frægt fyri seg, at hann var førur fyri at verja Frem málið fyri triðju ferð á rað. Gunnar var á beinkinum, meðan eitt sindur skaddi Jørgen Nielsen vardi Frem málið. Jón Rói Jacobsen var alla tíðina í miðverjuni, og Jónas Þór Næs var aftur hesa ferð alla tíðina á høgra vongverja.

Frem var á útivølli á heimavøllinum hjá Atla Gregersen og Skjold. Heimavøllurin hjá teimum er gamla og heiðurskrýnda Østerbro stadion. Nú er lítil heiður og æra innanfyri henda karmin. Sum so mangan áður so hava fleiri av kommunalpolitikarunum í Keypmannahavn undan kommunuvalinum, sum verður í Danmark um tvær vikur, eisini hesa ferð givið lyfti um, at gamla ítróttarøkið á Eysturbrúgv skal gerast av nýggjum. Tað treingir tað sanniliga til. Bæði vøllurin og umstøðurnar annars.

Frem vann 4-1 á Skjold. Harvið hevur Frem burturúr fýra teimum seinastu umførunum fingið tíggju stig. Tað hevur borið við sær, at botnplássið nú er munandi longri burtur, enn tað var fyri fáum vikum síðani.

Fyrsta løtan á Eysturbrúgv var syndarlig hjá Frem. Nítjan sekund vóru farin, tá ið dómarin brísklaði fyri brotssparkið til heimaliðið. 23. maðurin metti, at Jón Rói Jacobsen hevði verið orsøk til, at ein av mótstøðumonnunum var farin um koll, og heimaliðið fekk fulla úrtøku burturúr úr ellivu metrum.

Frem kom fyri seg. Teir javnaðu tíggju minuttir undan steðginum. Eftir steðgin var tað leingi spennandi. Eisini eftir at Frem í 65. minutti hevði lagt seg á odda 2-1. Tólv minuttir undan leikloki øktu teir til 3-1, og tveir minuttir undan leikloki var rimmar 4-1 sigurin staðfestur.

Síðsta umfarið í næstbestu deildini undan vetrarsteðginum verður næsta vikuskifti. Tá skal Frem spæla í Randers. Niðurflytararnir hava síðani kappingarbyrjan í summar so at siga støðugt verið millum tey fremstu. Nú eru teir dotnir aftur á triðja plássið. At teir eru til at tosa við, hava úrslitini tvær tær seinastu ferðirnar bent á. Í hesum umfarinum taptu teir 2-1 í Ølstykke, og fyri góðari viku síðani taptu teir 2-1 á heimavølli móti Brabrand.

Leygardagin vóru Andrew av Fløtum og liðfelagarnir í Fremad Amager í Brabrand, har tað eydnaðist teimum at vinna 2-1. Tað kom væl við, eftir at Fremad Amager fýra tær seinastu ferðirnar einki hevði fingið burturúr.

Hesa ferð sá heldur einki út, tí heimaliðið var frammanfyri 1-0, tá ið tað var hálvleikt. Málið fingu teir í 25. minutti. Andrew av Fløtum legði bragdliga fyri, tá ið tað í summar varð farið undir kappingina. Hann skoraði skjótt sjey mál, men síðani landsliðsferðina í Ísrael hevur tað ikki ligið nakað serligt fyri. Tað gjørdi tað heldur ikki hesa ferð. Fimm minuttir undan steðginum hevði Andrew góðan møguleika, men marginalirnir vóru ikki við.

Eftir steðgin varð Martin Skov settur inn á liðið hjá Fremad Amager, og hann hevði eydnuna við sær. Hann javnaði til 1-1, tá ið tað restaði eitt korter, og hann skoraði sigursmálið, tá ið tað restaðu fimm minuttir. Sunnudagin skal Fremad Amager spæla á heimavølli móti Ølstykke.

Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir hjá honum í Lyngby vóru í Fredericia, har tað endaði málleyst. Lyngby skal í síðsta umfarinum á heimavølli spæla lokaluppgerð móti HIK.

Køge, sum spældi 1-1 á útivølli móti HIK, er oddalið saman við Kolding, sum á heimavølli vann 2-1 á botnliðnum Brønshøj.

Feløgini hjá føroysku spælarunum eru nú miðskeiðis í røðini. Undantakið er Skjold, sum er niðanfyri strikuna. Skjold skal mikukvøldið spæla útsettan dyst á heimavølli móti Vejle, og leygardagin skulu teir spæla í Kolding.

Tá ið Frem í vikuskiftinum fer til Randers , verður tað síðsta ferðin, at Ebbe Skovdahl fer at hava ábyrgdina av liðnum. Venjarin hevur biðið um at verða loystur úr starvinum nú beinanvegin. Hann og felagið eru ikki samd um, hvussu framtíðar arbeiðið skal leggjast til rættis.

# Alt er sum tað plagar at vera

**Toppliðini í Danmark vunnu aftur hesa ferð, og Johan B. Hansen og hinir í Horsens verjuni fóru enn eina ferð av vøllinum, uttan at mál varð gjørt ímóti teimum**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Besta deildin í Danmark líkist sær sjálvari vikuskifti eftir vikuskifti. Oddaliðini vinna hvørja ferð, og tað tykist sum um, at tað skal bíðast eftir innanhýsis uppgerðum millum trý tey fremstu fyri at talan skal gerast um broytingar.

Í vikuskiftinum var 16. av 33 umførum á skránni. Oddaliðið FCK hevur framvegis ikki tapt. Hesa ferð høvdu teir vitjan av illa sperda FCM, sum megnaði at halda tørn í 1. hálvleiki. Eftir steðgin skoraði heimaliðið tvær ferðir. Í báðum førum var málskjúttin Peter Møller. Nógv varð gjørt burturúr, tí nú er hann við 144 málum besti málskjúttin nakrantíð í bestu donsku deildini.

Brøndby hevði vitjan av AGF, sum fór til hús aftur við 4-0 tapi. Heimaliðið spældi illa stadda felagið úr Århus sundur og saman.

Viborg er framvegis á triðja plássi, eftir at teir vunnu 2-0 á heimavølli móti AaB. Súni Olsen var inntil miðskeiðis í 2. hálvleiki á AaB miðvøllinum. So varð hann skiftur út.

Eitt av fáu óvæntaðu úrslitunum var í Farum. Eftir laka kappingarbyrjan hevur FCN leingi verið støðugt, og undan vikuskiftinum vóru teir á fjórða plássi. Hjá Esbjerg hevur tað ikki hilnast á leið so væl, sum tað hevur gjørt undanfarnu árini. Men hesa ferð vendi tað niður, sum leingi hevur vent upp og tað upp, sum leingi hevur vent niður. Esbjerg vann 2-0, og í báðum førum var tað svenski Fredrik Berglund, sum var málskjútti. Hann hevur áður verið rættuliga málsøkin, men nú var langt síðani seinast, at hann var málskjútti.

Undan vikuskiftinum kom fram, at Esbjerg skal hava nýggjan venjara í vetrarsteðginum. Ove Pedersen, sum er ein tann best umtókti venjarin í superliguni, hevur gjørt avtalu við AGF, har hann næstu árini skal royna at fáa illa staddu fótbóltsskútuna aftur á beint.

Johan Byrial Hansen var aftur alla tíðina í Horsens verjuni. Horsens hevði vitjan av OB, og úrslitið var 0-0. Hetta var sætta ferðin í hesum kappingarárinum, at Horsens var partur av málleysari uppgerð. Teir á heimaliðnum iðraðu seg, tí teir høvdu møguleikar at gera mál, og gestirnir fegnaðust um, at tað eydnaðist teimum at sleppa til hús við einum stigi.

Tá ið úrslitið so ofta er málleysur javnleikur, so verður fokus ofta sett á, at álopsparturin er tannleysur, og at spælið er lítið undirhaldandi. Í Horsens halda teir tað vera ikki minni áhugavert at staðfesta, at verjan hjá teimum er so stinn, at einki mál er farið ígjøgnum í seks av sekstan dystum.

Rógvi Jacobsen hitaði upp stóran part av 2. hálvleiki, tá ið SønderjyskE var í Silkeborg. Rógvi kom tó ikki á vøllin, men saman við liðfeløgunum var hann ovurfegin um úrslitið. SønderjyskE vann 1-0. Málið fingu teir í yvirtíðini, og málskjútti var brasiliumaðurin Leandro Santos. Rógvi hevur seinastu ferðirnar ofta verið settur á vøllin síðstu løtuna. Hesa ferð var tað brasiliumaðurin, sum fekk møguleikan, og hann tók av.

Uppgerðin var serlig á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin, at nýggi venjarin hjá SønderjyskE, Morten Bruun, var við til at vinna. Tað var í tøkum tíma. SønderjyskE er framvegis aftast, og hetta var áttanda royndin hjá nýggja venjaranum.

Sigurin gjørdist ikki minni merkisverdur av, at hann varð vunnin í Silkeborg. Morten Bruun hevur ofta verið nevndur Mr. Silkeborg. Hann var stóri spælaraprofilurin í barndómsfelagnum í mong ár. Hann hevur verið venjari í Silkeborg, nevndarlimur og pressutalsmaður. Tí var ikki undur í, at hann eftir dystarlok segði seg hava ilt av Silkeborg. Men sjálvandi fegnaðist hann saman við Rógva Jacobsen og hinum í SønderjyskE um, at teir nú ikki eru so nógv aftanfyri AGF og Horsens, sum teir vóru tað undan vikuskiftinum.